# Býráðið

**Dagfesting:** 23.02.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 3/23 | 23/00096-1 | Uppskot til broyting í fráfaringaraldri |
| 4/23 | 21/00287-7 | Ognartøka av matr. nr. 804 í Fuglafirði |
| | | |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

**3/23**
**23/00096-1 Uppskot til broyting í fráfaringaraldri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 8/23 |
| 2 Býráðið | 23.02.2023 | 3/23 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í starvsfólkahandbókini hjá Fuglafjarðar kommunu skjal 3.14 "Eldraviðurskifti" er ásetti fráfaringaraldurin 67 ár.<br><br>Í mars mánaða 2022 kom nýtt rundskriv nr. 9001 frá 9.mars 2022 um fráfaringaraldur fyri alment sett starvsfólk.<br><br>Rundskrivið er galdandi fyri sáttmálasett alment sett starvsfólk og tískil ikki fyri kommunalt sett starvsfólk. Rundskrivið ásetur millum annað at:<br>*"4. Fráfaringaraldur*<br>*4.1. Fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum almennum starvsfólkum er 72 ár.*<br>*4.2. Tað áliggur almenna arbeiðsgevaranum at siga alment sáttmálasettum starvsfólki upp í so góðari tíð, at tey kunnu fara úr starvi við endan á tí mánaði, tey fylla 72 ár.*<br>*4.3. Arbeiðsgevarar kunnu tó velja at leingja setanina, eftir at starvsfólk hava fylt 72 ár. Tað verður gjørt við at seta starvsfólkið í eitt upp í tvey ára tíðaravmarkað starv.*<br>*4.4. Leingjan sambært nr. 4.3 kann verða gjørd fleiri ferðir."*<br><br>Tórshavnar kommuna valdi í 2022, at avtaka fráfaringaraldurin, meðan eitt nú Runavíkar kommuna hevur 70 ár sum fráfaringaraldur og Klaksvíkar kommuna hevur ongan samtyktan fráfaringaraldur. Eysturkommuna og Nánd hava 70 ára fráfaringaraldur. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Í Fuglafjarðar kommunu er áleið 123 mánaðarlønt starvsfólk. Av teimum eru 44 menn og 79 kvinnur. Bert 13 teirra eru í aldursbólkinum millum 60-70 ár. Broytta aldurssamansetingin í |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Føroyum kann tó væntast at viðføra, at munandi fleiri eldri vera framyvir. Tí eigur støða at takast til hvørt núverandi fráfaringaraldur eigur at standa við ella broytingar skulu gerast og skal hetta sambært kommunustýrislógini viðgerast í Fíggjarnevndini. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin og rundskriv nr. 9001 frá 9.mars 2022<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>3.14 Eldraviðurskifti | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Av tí at vit við tíðini gerast lutfalsliga fleiri og fleiri eldri er skilagott ikki at avmarka atgongdina hjá Fuglafjarðar kommunu til hendan aldursbólk og mælir umsitingin og borgarstjórin tískil til at seta í gildið samsvarandi fráfaringaraldur sum landið hevur ásett í omanfyrinevnda rundskrivið. | | |
| Dagf | 19. februar 2023 | | |



**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Fíggjarnevndin mælir til at nýta sama fráfaringaraldur, sum grannakommunan og eldrasamstarvið í kommununi, tað er 70 ár og mæla býráðnum til at samtykkja hetta.

**Býráðið 23. februar 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at broyta fráfaringaraldurin til 70 ár fyri starvsfólk í Fuglafjarðar kommunu.

**4/23**
**21/00287-7 Ognartøka av matr. nr. 804 í Fuglafirði**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.02.2023 | 8/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.02.2023 | 10/23 |
| 3 Býráðið | 23.02.2023 | 4/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Talan er um ognartøku av 22 fermetrum av matr. 804 við Toftanesvegi í Fuglafirði. Tá ognartøkan er framd verður matr. 804 lagdur saman við matr. 769 b.<br><br>Talan er um eitt matr., sum er arvað av 5 arvingum. Onkur av hesum arvingum er ikki á lívi longur, sum eisini hava arvingar.<br><br>Tað hevur víst seg higartil ikki at borið á mál við at fáa fatur á øllum arvingunum.<br><br>Tað skilst at semja var ímillum upprunaliga arvingarnar um hvør skuldi fáa stykkið.<br><br>Av tí tað er trupult at fáa fatur á eftirkomarunum hjá upprunaligu arvingunum, at talan er um lutfalsliga lítið stykkið og harvið lutfalsliga upphædd, verður mett at mest skynsamt er at ognartaka lendi.<br><br>Ognartøkan verður gjørd sambært § 12 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mei 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, seinast broytt við løtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrisskipanini §24 stk. 9 skal tekniska nevnd senda býráðnum um fíggjarnevndina tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt Kommunustýrisskipan hjá Fuglafjarðar kommunu og løgtingslóg nr. 13 frá 21. mei 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, seinast broytt við løtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Samskifti við US v.fl. um skeyti<br>Skriv um ognartøka matr. nr. 804 |

4

| | |
|---|---|
| | kort yvir ognattøka av matr. nr. 804 |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður teknisku nevnd at taka undir við at ognartøka matr. nr.804 í Fuglafjarðar kommunu við tí endamáli at leggja tað saman við matr. nr. 769b í Fuglafjarðar kommunu og at tekniska nevnd mælir fíggjarnevndini og býráðnum at samtykkja hetta. | | |
| Dagf | 22. februar 2023 | | |

**Tekniska nevnd 23. februar 2023:**
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum og mælir fíggjarnevndini og býráðnum at samtykkja at fara undir ognartøku av matrikul 804 í Fuglafjarðar kommunu.



**Fíggjarnevndin 23. februar 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og mælir býráðnum til at samtykkja, at farið verður undir ognartøku av matrikul 804 í Fuglafjarðar kommunu.

**Býráðið 23. februar 2023:**
Býráðið samtykti at ognartaka matrikul 804 í Fuglafjaðrðar kommunu við 8 atkvøðum fyri og 1 blankari.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen